# Havnar Bio

UMMÆLI:

# Einglar deyðans siga eyga fyri eyga



**Filmurin hjá Steven Spielberg um München 1972 er væleydnaður.**

*Kim Simonsen*

Í september 1972 varð heimurin vitni til eina serliga ógvusliga gíslatøku, ið hendi undir Olympisku Leikunum í München. Hendingin í München varð send beinleiðis í sjónvarpinum í 21 tímar. Endin var, at øll ítróttarfólkini, ið vóru tikin sum gíðslar av palestinensiskum yvirgangsmonnum, vóru dripin.

Royndin at bjarga ísraelsku ítróttarfólkunum endaði sum ein sorgarleikur. Á hernaðarflogvøllinum Fusternfeldbruck í München, vóru allir gíslanir dripnir og teir flestu yvirgangsmennirnir eisini.

Her endaði søgan ikki, og í filminum München, eftir heimsins kendasta leikstjóra, Steven Spielberg, byrjar her, aftaná at øll tey 17 ísraelsku ítróttarfólkini vóru dripin við køldum blóði.

Í tíðini aftaná fór Ísrael harðliga fram móti PLO-basum, men søgan í filminum München, snýr seg ikki um hetta, men um ein loyniligan bólk av monnum, ið arbeiddu við at avrætta allar teir, ið høvdu ábyrgd at hesi skemdargerð.

Ísraelska fregnartænastan Mossad visti hvør hevði ábyrgd av yvirganginum, og fóru i gongd við eina eyga fyri eyga týning av øllum teim 11 bakmonnunum til yvirgangin í München í 1972. Drápini skuldu ikki bert hevnast, men hesir arábar skuldu ikki aftur fremja yvirgang móti statinum Ísrael, teirra útsendu ella ítróttafólkum.

München, snýr seg um hendan bólkin av monnum, ið allir eru serfrøðingar innan teirra øki, ið fingu sum uppgávu at beina fyri 11 bakmonnum. Teir ferðast kring evropeisk lond, sum Ongland, Týskland, Grikkaland, Holland, Frankaríki, Italia og spreingja hesar bakmenn í luftina. Ferðin gongur eisini til arábisk øki og til New York. Tað er ikki ofta, at eg havi sæð ein film, ið er so fulkominliga uttan landamørk, tí er tað eisini ein fragd at síggja hendan filmin, ið er væl gjørdur, spennandi og av og á vakurt filmaður.

Leiðarin fyri hendan Mossadbólkin er fyrrverandi lívverjin Avner (Eric Bana frá ”The Hulk”). Hann hevur verið lívverji hjá sjálvari Golda Meir, ið eisini er við í filminum, leikt av Lynn Cohen.

Avner skal virka í loynd, hann hevur einki samband við heimlandi Ísrael, bert við eina bankaboks í Sveits. Teir sum hjálpa honum eru agentar, ið annars liva friðarlig sivil lív. Steve er bilførarin fyri bólkin. Hin týski antikvitetshandlarin Hans er dokumentfalsnari. Belgiski leikuuppfinnarin Carl er bumbumaður. Hin klóki og varni Carl ruddar øll spor eftir drápini. Filmurin tekur sær góða tíð til at vísa okkum hesar menn og teirra lyndi. Tekniskt sæð eru teir ikki yvirgangsfólk, men hvør er yvirgangsfólk, tey sum drepa ósek, ella tey sum drepa yvirgangsfólk?

Teir byrja at samarbeiða við eina undirverð av vápnahandlarum og fólkum, ið kanska kenna onkran, sum veit hvar arábisku yvirgangsfólkini krógva seg.

Loyniligi Avner-bólkurin undir ísraelsku fregnartænastuni Mossad, fær fatur á einum fyri og øðrum eftir, ið teir antin skjóta til deyðis ella spreingja í luftina.

At byrja við gongur alt sum eitt spæl, men við eitt uppdagar Avner, at eisini teir verða forfylgdir av fregnartænastum og leigumordarum. Er tað tí palestinensarnir eru sameintir við Sovjettsamveldið og KGB, ella er hetta CIA ella onnur lið innan Mossad? Her gerðst filmurin av álvara spennandi.

Vit kenna søguna um 4. og 5. september 1972 í München, men ikki nógv kenna til tað sum hendi aftaná. Tað sum Avner-bólkurin koma at gera kring ein stóran part av heiminum, varð kallað ”Operatión Guds vreiði”. Tveir ísraelskir generalar Aharon Aviv (1993) og Zvi Zamir (2001), hava víst á, at Avner-bólkurin var ein av fýra ymiskum loyniligum bólkum, ið avrættaðu 13 yvirgangafólk uttan rættarmál ella dóm.

München er ein merkeliga aktuellur filmur, ið ikki bert snýr seg um 1972, tí yvirgangur er eitt sera kontroversielt mál í dag. Hvussu skulu vit niðurberja yvirgang? Ein máti er so sum Mossad, at jagstra hesi í loynd um allan heim og avrætta tey á staðnum.

Vit halda kanska, at yvirgangur er eitt stórt tema í Evropa. Sjálvt um nógv vóru dripin bæði í Barselona og í London í fjør, er hetta lítið av miklum í mun til hvat tey í Ísrael hava uppliva gjøgnum árini.

Eg haldi, at tað er eitt spennandi perspektiv, at Ísrael og ísraelska Fregnartænastan Mossad í 30-40 ár hava jagstrað yvirgangsfólk kring allan heim. Hevði Mossad ansa eftir Osama bin Laden , ið aftur nú hevur ávara USA um nýggj álop, ið frættist frá rásini Al-Jazeera herfyri, høvdu vit so uppliva 11 september 2001?

Steven Spielberg er nærum mister Hollywood, hann hevur gjørt stórar blockbuster-filmar síðani ”Jaws” (Dødens gab) frá 1975. Serliga eykenni hjá Spielberg var at hann endurskapti b-film genruna sum dýrar blockbuster filmar. Seinni hava vit tó sæð onkran áhugaverdan film eftir hann, so sum ”Solens rige”, ”Schindlers liste” og ”Saving Private Ryan” og so hendan filmin.

München er ein uppskakandi og spennandi filmur frá enda í annan, tí vit vita líka so lítið sum Avner og teir.

Eisini er ein kærleikasøga við í filminum, millum Avner og konuna Daphnu (Ayelet Zurer), ið er uppá vegin tá filmurin byrjar. Daphna gevir Avner eitt samband við sivila og friðarliga lívi. Bæði uppliva tó hvussu teirra óseka samlív og lyndi broytist, ið helst er ein mynd av, hvussu teirra land Ísrael kom at broytast í hesum árum.

Filmurin fær 5 stjørnur av 6.

TÍÐIRNAR:

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**




## Nanny McPhee

*FRUMSÝNING*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 27.01 | kl. 17.45 | |
| Leygardag | 28.01 | kl. 16.00 | kl. 18.00 |
| Sunnudag | 29.01 | kl. 17.00 | |




## München

*FRUMSÝNING*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 27.01 | kl. 19.45 | kl. 23.00 |
| Leygardag | 28.01 | kl. 20.00 | kl. 23.15 |
| Sunnudag | 29.01 | kl. 19.00 | kl. 22.15 |




## Narnia

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadag | 27.01 | kl. 19.00 | |
| Leygardag | 28.01 | kl. 16.30 | kl. 19.30 |
| Sunnudag | 29.01 | kl. 18.30 | |




## Jarhead

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadag | 27.01 | kl. 22.30 |
| Leygardag | 28.01 | kl. 22.30 |
| Sunnudag | 29.01 | kl. 21.30 |

**www.bio.fo • Telefon 31 19 56**